








# Handilshøli í SMS til leigu

**"Eingir pengar eru eingin forðing, men einki hugskot er ein forðing."**

(- Amerikanski uppfinnarin, Ken Hakuta)

Hevur tú eitt gott handilshugskot, tú kundi hugsað tær at roynt í verki, er tað kanska tær, vit leita eftir. Eigur tú eitt gott hugskot, sum tú sjálvur trýrt uppá, og sum tú eisini dugir at fáa okkum at trúgva uppá, vilja vit fegin frætta frá tær. Tað skal bara vera væl gjøgnumhugsað, so tú veitst og kanst greiða okkum frá, hvussu tað kann gerast veruleiki.

Um tú hevur hugskotið til ein góðan handil, ið kann gera SMS til eina enn betri handilsmiðstøð, eiga vit hølið at leiga tær. Talan er um handilshøli, ið er til taks hjá tí, sum er førur fyri at sannføra okkum um, at talan er um júst rætta handilin, SMS hevur tørv á at fáa aftrat.

Vit eru opin fyri øllum møguleikum, so meinar tú tað í álvara og veitst, at títt hugskot er eitt, ið heldur, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum. Einki er ov lítið og einki ov stórt – bara tað er gott!

Áhugaði kunnu ringa til Boga Andreasen, býlingsstjóra á tel 23 34 30, ella senda ein teldupost til bogi@sms.fo.

Vit gleða okkum at hoyra um títt handilshugskot.

© 2011 | 1XPETUR.COM

sms

**SMS · á Trapputrøðni · 100 Tórshavn · Tel 34 19 00 · sms@sms.fo · www.sms.fo**